Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Súkkling í tunlum norður um Fjall

Spurningar:

1. Hvørjar tankar ger landsstýrismaðurin sær um at seta sonevndar súkklukontaktir upp við tunnilsmunnarnar í tunlunum norður um Fjall?

Viðmerkingar:
Í svari til fyrispurning frá Steffani K. Poulsen, løgtingsmanni, á sumri í fjør er mett, at kostnaðurin fyri súkklukontaktir í tunlunum norð um Fjall er 70.000 kr. fyri hvønn tunnil.
Meiningin við súkklukontaktum er, at fólk á súkklu skulu kunna trýsta á eina kontakt uttanfyri tunnilin, sum síðan ávarar bilferðsluna um, at súkklur eru í tunlinum.
Í nýggjari frágreiðing frá Landsverki er lagt upp til at betra um súkklumøguleikar í tunlum.
Samstundis er lagt upp til, at eru strekkini upp til umleið 5 kilometrar, so ber væl til at gera súkkluferðslu til ein fastan part av gerandislívinum hjá fólki.
Úr miðbýnum í Klaksvík til Árnafjarðar eru góðir 5 kilometrar, tá tunlarnir norður um Fjall eru gjørdir, harav einir 2 kilometrar verða innandura.
Strekkið millum Árnafjørð og byrgingina um Hvannasund er somuleiðis umleið 5 kilometrar, harav góðir 2 kilometrar verða undir taki, tá tunnilin er liðugur.
Av tí at tunlarnir norður um Fjall enn eru í gongd, og tað kann økja um trygdina og møguleikarnar hjá ábærari ferðslu í Norðoyggjum kann tykjast viðkomandi at umhugsa hesa skipan við súkklukontaktum í tunlunum norður um Fjall.

Á Løgtingi, 19. juni 2024

Eirikur í Jákupsstovu